

# Lítli bollin, sum broytti vesturheimin

SUNNUDAGIN 9. MAI HEVÐI P-BOLLIN **50 ÁRA FØÐINGARDAG**. LÍTLA UNDRIÐ VAR LEINGI ÁVEGIS, ÁÐRENN AMERIKONSKU MYNDUGLEIKARNIR Í **1960** LOYVDU NÝTSLU AV P-BOLLANUM SUM **FYRIBYRGING**. TAÐ VAR EITT STÓRT FRAMBROT Í KVINNUFRÍGERINGINI – OG Í DAG TAKA YVIR **100 MILLIÓNIR** KVINNUR KRING ALLAN HEIM P-BOLLAN DAGLIGA



**SØGAN UM P-BOLLAN**

Eydna Skaale
eydnaskaale@hotmail.com

Spurningurin er, um nøkur uppfinning man hava havt so stóra ávirkan á vesturheimin, sum p-bollin hevur havt. Tað, at parlagið ikki longur merkti ein stóran barnaflokk og nógvar munnar at metta, hevur havt alstóran týdning fyri menningina og sosialu gongdina í vesturheiminum.

### Barnatalið ein trupulleiki

Kunningin um barnsburð og biologi var lítil og eingin fyrst í farnu øld, tí evnið var strangt tabu. Tískil merkti hjúnarbandið ein riðil av børnum, og serliga kvinnurnar liðu undir hesum, tí tað var strævið at eiga og passa so nógv børn. Kvinnurnar vóru somuleiðis illa kroystar, tí maðurin hevði eftir lógini rætt at stinga í sekkin, um konan ikki vildi gera sína hjúnaðarligu skyldu. Og at standa einsamøll við einum stórum barnaflokki var ógjørligt. Tí var tað nærum ógjørligt at avmarka barnatalið.

Eingin fyribyrging var, og tey vóru fá, ið vóru so ósømilig at taka evnið uppá tungu. Tað var eisini beinleiðis ólógligt, tí lógir vóru, sum bannaðu øllum fyribyrgjandi evnum. Ymsu trúarsamfeløgini høvdu somuleiðis so stórt vald, at sjálvt ikki heilivágsfeløgini hildu seg til at finna eina loysn.

Men tað vóru tó nakrar damur, sum løgdu líka í hvat var lógligt og hvat var sømiligt og sum bardust fyri kvinnusakini. Ein teirra var Margaret Sanger, sum alt sítt lív hevði stríðst fyri at fáa fyribyrging til kvinnurnar. Hon var vorðin 71 ára gomul, tá hon umsíðir fann ein granskara, Gregory Pincus, sum var føðingarlækni og sum vildi átaka sær uppgávuna. Men teimum manglaðu pening, inntil tann tá 78 ára gamla og sera ríka Katherine McCormick játtaði at gjalda. Eitt heilivágsfelag og ein gynækologur, John Rock, komu eisini upp í leikin, og so var grundin undir p-bollanum løgd.

### Eingi mótmæli

Tá arbeiðið kom so mikið langt, at tað var klárt at avdúka p-bollan, høvdu tey ímyndað sær risastóra mótstøðu og eitt satt rok. Men tað komu bert fá mótmæli, og ístaðin streymaðu milliónir av kvinnum til læknarnar fyri at fáa hendur á hesi lítlu tablettini við stóra árininum. Bert katólska kirkjan var áhaldin í sínum mótmælum.

Tey allarflestu sóu nú fyrimunirnar av at kunna sleppa undan óynskum børnum uttanfyri hjúnarlag – ella ótalligum barnsburðum innanfyri